## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og seinnapartin regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, partvís heglingur. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Upp í hvassan vind av útsynningi, seinni hækkar hann upp í útnyrðing. Kavaælingur og hitalagið um frostmarkið.

# REX slær dyrnar upp



*Leygarkvøldið letur Platform uppaftur sum REX. Hølini eru fullkomiliga broytt, og aldursmarkið er sett upp á 25 ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Leygarkvøldið letur REX Night Club upp fyri fyrstu ferð**

UPPLATING
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Dansistaðið Platform er nú vorðið til REX Night Club og REX Culture Club. Og leygarkvøldið verður latið upp í spildurnýggjum hami.

Ætlanin er at staðið skal lokka tey 25-40 ára gomlu at støkka inn á gólvið, og tí er aldursmarkið eisini sett upp á 25 ár.

### Hækka tænastustøðið

Ætlanin er at REX Culture Club skal gerast til eitt slag av mentanarmiðdepli. Talan verður um alt frá jazzkvøldum til kórsang, upplestur, gospelkvøld. Tað skal verða fríggjakvøld, meðan dansistaðið skal hava opið sum náttklubbur leygarkvøld. Tað verður eisini við livandi tónleiki í so stóran mun sum møguligt.

Eisini er ætlanin at gera onkur serlig kvøld, so sum vínkvøld, fronsk kvøld, sponsk kvøld, har skipað verður fyri mati og øðrum góðum afturvið. Kvøldini verða skipað sum teu vælumtóktu jólaborðhaldini við tónleiki og undirhaldi.

Tænastustøðið skal í topp. Og er Michael Jensen, sum hevur verið yvirtænari á Hotel Hafnia í mong ár, sum kemur at taka sær av hesum.

– Vit hava eisini víðkað um úrvalið av vínum, cognac og whiskey, og eisini hava vit fingið onkrar góðar sigarir, tí vit meta, at hesin aldursbólkurin setir eitt sindur størri krøv enn tey yngru, sigur Havgrímur Johannesen.

Sum nakað nýtt verður eisini møguleiki at fáa okkurt lætt til matna. Salat, tvíflísar og annað verður at fáa um kvøldini.

Umbyggingarnar hava annars veruliga verið í gongd, síðani gamla Platform lat aftur 1. januar. Tað ljósa er skift út við tað myrka, og fleiri sitipláss vera eisini til gestirnar.

Leygarkvøldið verða dyrnar so slignar upp. Byrjað verður longu klokkan 22 fyri innbodnum, og síðani verður latið upp kl. 1 fyri almenninginum. Tað verða Showmenn, sum fara at standa fyri tónleikinum hetta kvøldið.

ÚF
**Morgunlestrar**
**17.– 22. januar**

***Jóhan Hendrik Winther Poulsen, í Kirkjubø lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 17. januar:**
nr. 460 Eg hoyrdi Jesu kærleiksorð

**Týsdagin 18. januar:**
nr. 53 Ongum er so trygt at fara

**Mikudagin 19. januar:**
nr. 145 Ójavnt Harrin gávur býtir
nr. 317 Hvørja hugsan og hvørt orð

**Hósdagin 20. januar:**
nr. 266 Hvat best mær tørvar, Harri Gud
nr. 276 Miskunna mær, Guð

**Fríggjadagin 21. januar:**
nr. 54 Tú fylgdi mær fyrst

**Leygardagin 22. januar:**
nr. 396 Komi ríki títt við megi

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -1 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 8 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 11 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 36 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Ein hátrýstryggur, 1019 hPa. yvir Íslandi fer eystureftir. Eitt djúpt lágtrýst, 965 hPa. í landsynningi úr Hvarvinum fer spakuliga eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landsynningi úr Hvarvinum fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadag seinnapart.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/1 kl. 06[00]–13/1. 06[00]. Hitin í gjár: 1,8°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 12/1 kl. 06[00]–13/1 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 137,8 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

10. januar Tendring/Mánin næstur jørðini
17. januar Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. Jan | 09.58 | 22.19 | 08.58 | 21.19 | 09.13 | 21.34 | 11.58 | - | 00.32 | 12.58 | 08.13 | 20.34 | 07.13 | 19.34 | 10.13 | 22.34 | 11.13 | 23.34 | 09.43 | 22.04 | 10.58 | 23.19 |
| 15. Jan | 10.42 | 23.03 | 09.42 | 22.03 | 09.57 | 22.18 | 00.19 | 12.42 | 01.19 | 13.42 | 08.57 | 21.18 | 07.57 | 20.18 | 10.57 | 23.18 | 11.57 | - | 10.27 | 22.48 | 11.42 | - |
| 16. Jan | 11.25 | 23.46 | 10.25 | 22.46 | 10.40 | 23.01 | 01.03 | 13.25 | 02.03 | 14.25 | 09.40 | 22.01 | 08.40 | 21.01 | 11.40 | - | 00.18 | 12.40 | 11.10 | 23.31 | 00.03 | 12.25 |
| 17. jan | - | 12.07 | 11.07 | 23.56 | 11.22 | - | 01.46 | 14.07 | 02.46 | 15.07 | 10.22 | 23.11 | 09.22 | 22.11 | 00.01 | 12.22 | 01.01 | 13.22 | 11.52 | - | 00.46 | 13.07 |
| 18. Jan | 00.56 | 13.31 | - | 12.31 | 00.11 | 12.46 | 02.56 | 15.31 | 03.56 | 16.31 | 11.46 | - | 10.46 | 23.22 | 01.11 | 13.46 | 02.11 | 14.46 | 00.41 | 13.16 | 01.56 | 14.31 |

5 707265 100050 >